# Næstan hálva øld í Húsalánsgrunninum

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Almenn móttøku var á Parnassinum á Hotel Hafnia fríggjadagin 13. juni í sambandi við at Jóannes Dalsgarð fer frá sum stjóri í Húsalánsgrunninum, eftir at hava starvast har síðani grunnurin var stovnaður 1964. Seinastu 28 árini var Jóannes stjóri á Húsalánsgrunninum.

Jóannes Dalsgarð er argjamaður, men vaks fyri tað nógva upp í Sandavági, hiðani mamman er ættað. Komin aftur til Argjar eftir lokna skúlagongd lærdi hann í handlinum hjá Valdemar Lútzen í Vágsbotni.

Seinni fór hann at starvast hjá verfaðirinum, Hanusi við Høgadalsá, sum var reiðari og eisini umsat tann tá nýstovnaða Húsalánsgrunninum miðskeiðis í sekstiárunum.

Eftir at Húsalánsgrunnurin varð umskipaður og Hanus við Høgadalsá legði frá sær sum stjóri, setti landsstýrið Jóannes sum stjóra í grunninum, sum fekk stóran og týðandi lut í sethúsafíggindini sum fráleið. Jóannes hevur stjórnað Húsalánsgrunninum fyrimyndarliga saman við góðum starvsfólkum. Bæði í arbeiði, í ítrivi og í øðrum høpi er hann røkin og hjálpsamur.

Jóannes hevur altíð verið virkin. Í mong ár spældi hann við 1. og 2. mansliði hjá Kyndli, eins og hann hevur verið nevndarlimur og formaður í felagnum. Sum hugsjónarmaður og formaður í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag átti Jóannes sín stóra leiklut í at gera Tjóðveldisflokkin til størsta flokk viðvalið í 1998.



*Jóannes Dalsgarð fer frá sum stjóri í Húsalánsgrunninum, eftir at hava starvast har síðan 1964*



*Hjúnini Guðrun og Jóannes Dalsgarð*



*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, hevur arbeitt nógv ár í Húsalánsgrunninum*







*Familja, vinir og kenningar vóru til móttøkuna á Hotel Hafnia fríggjadagin 13. juni*